tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 26.06.2025 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, ~~Alvi Mortensen~~, Barbara Michalina Tausen, Bjarni Hammer, Eyð Jóna Eidesgaard og ~~Arnfinn Bech~~

Varalimir: Tóki Justinussen og Jens Rói Sørensen

Ikki møtt: Alvi Mortensen og Arnfinn Bech

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 44/25 | 25/00227-2 | Tvøroyrar kommuna -roknskapur 2024 |
| 45/25 | 25/00191-2 | Mýrifípan -barnaansing tíðliga á morni (kl. 06.30) |
| 46/25 | 25/00235-2 | FSR -Umsókn umstuðul til rakstur av nýggja neystinum á Hvítanes |
| 47/25 | 25/00250-1 | Bilur til gartnarin |
| 48/25 | 25/00212-2 | GIGNI -áheitan um at fáa skipanina við heilsufrøðingi í Tvøroyrar skula at virka samsv. áseting. |
| 49/25 | 25/00176-1 | Heilsudepil á Tvøroyri -læknamiðstøð fyri alla Suðuroynna |
| 50/25 | 25/00218-2 | Apotekið -fyrisp. um hølir |
| 51/25 | 24/00198-1 | Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn -framtíðarætlanir |
| 52/25 | 24/00308-2 | Føroya Eftirskúli -umsókn um stuðul skúlaári 2025 |
| 53/25 | 25/00214-2 | VERKFO - Fyrispurningur um grót til útfylling til keiøkið |
| 54/25 | 25/00257-2 | Dráttur til nýggja kappróðrarneystið hjá FSR |
| 55/25 | 24/00074-2 | Økistónar - Umsókn um stuðulsskipan til føroysk spælistøð, ið skal tryggja úti við 600 konsertir kring landið. |

| Til kunningar | | |
|---|---|---|
| | | |

**Kunning til býráðið**
Kristin Michelsen, borgarstjóri setur fundin, og kunnar um, at Alvi Mortensen hevur fráboðað, at honum berst frá at møta til býráðsfundin í dag 26 Juni 2026, og hevur hann heitt á Tóka Justinussen, ið er fyrst valdi tiltakslimur á *"lista T, Felagslistin"* til kommunustýrisvalið 20. november 2024, um at møta fyri seg.

Tóki Justinussen hevur havt sæti í býráðnum hetta valskeiði, og verður tí at taka sæti til býráðsfundin uttan atkvøðugreiðslu.

Kristin Michelsen, borgarstjóri boðar frá, at Arnfinn Bech hevur fráboðað, at honum berst frá at møta til býráðsfundin í dag 26 Juni 2026, og hevur hann heitt á Jens Róa Sørensen, ið er fyrst valdi tiltakslimur á *"lista F"* til kommunustýrisvalið 20. november 2024, um at møta fyri seg.

Jens Rói Sørensen hevur ikki havt sæti í býráðnum hetta valskeiði, og verður tí atkvøtt um hvørt Jens Rói Sørensen kann taka sæti í býráðnum til henda býráðsfundin. -einmælt samtykt.

**Skrá og viðmerkingar til hesa:**
Kristin Michelsen, borgarstjóri lesur skránna til fundin í dag og kunnar um at tvey mál eru komin aftur at skránni, *“54/25 Dráttur til nýggja kappróðrarneystið hjá FSR”* og *“55/25 Økistónar, umsókn um stuðulsskipan til føroysk spælistøð, ið skal tryggja úti við 600 konsertir kring landið*” eftir at skráin bleiv kunngjørd alment.

Kristin Michelsen spyr um viðmerkingar eru til skránna – Barbara Tausen viðmerkir, at hon metur seg verða ógegniga at viðgerða mál 45/25 Mýrifípan -barnaansing tíðliga á morgni (kl. 06.30)

Kommunustjórin:
Viðmerking til roknskapin, Alvi Mortensen og Arnfinn Bech, hava gjøgnum gingið roknskapin saman við fíggjarleiðaranum, og hava undirskriva henda áðrenn fundin í dag 26.06.2025.

**Til støðutakan**

## 44/25
## 25/00227-2 Tvøroyrar kommuna -roknskapur 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.06.2025 | 70/25 |
| 2 Býráðið | 26.06.2025 | 44/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 3.06.2025**
Borgarstjórin, fíggjarleiðarin og kommunustjórin hava gjøgnumgingið roknskapin fyri Tvøroyrar kommunu 2024, sum er grannskoðaður av Løggilda grannskoðaravirkinum Januar, Óðinshædd 13, 110 Tórshavn.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 30. apríl 2018, §38, at leggja grannskoðaðan roknskap saman við grannskoðanarfrágreiðingini fyri kommunustýrið til góðkenningar og undirskrivingar.

**Fíggjarligar avleiðingar:** Fíggjar- og rakstraræetlan fyri Tvøroyrar kommunu.

---

**Frágreiðing um grannskoðanina**

**Niðurstøða av framdu grannskoðanini – grannskoðanarátekning**
5. Grannskoðanin av ársfrásøgnini hevur ikki givið orsøk til atfinningarsamar viðmerkingar. Um so er, at kommunustýrið góðkennir ársroknskapin í verandi líki, geva vit honum eina grannskoðanar-átekning uttan tillagingar og áherðslur.

Harumframt hava vit í samsvari við § 10, stk. 7, í kunngerð um roknskaparverk kommunanna o.tíl. kannað eftir, at upplýstu tølini til Fíggjarmálaráðið fyri tey einstøku tíðarskeiðini samsvara við bókhaldið hjá kommununi, og hava vit gjørt eina átekning uttan vissu í hesum sambandi.

6. Grannskoðanin er farin fram í mai 2025. Allir postar eru gjøgnumgingnir.

**Samanbering av roknskapi við fíggjarætlan og fíggjarliga gongdin**
Í sambandi við grannskoðanina er hugt eftir gongdini í bæði rakstri og løgum í 2024. Niðanfyri er ein talva, sum líkist høvuðsyvirlitinum í ársroknskapinum, sum vísir nettogongdina í 2024. Tølini í talvuni niðanfyri eru nettotøl og ikki bruttotøl

Í fíggjarætlanini fyri 2024 varð roknað við einum halli á 21.138 tkr. Ætlanin var at niðurrinda skuld við 3.374 tkr., og at aðrar fíggjarbroytingar vóru á 24.464 tkr. Netto gevur hetta 28.138 tkr.

Ársroknskapurin vísir eitt hall á 1.303 tkr. Hetta gevur ein nettomun millum fíggjarætlan og roknskap á 26.835 tkr. Niðanfyri er útgreining av, hvussu hesin munur er nýttur:

| Grein | Rakstur (tkr.) | FÆ 2024 | R 2024 | Frávik 2024 | R 2023 | R 2022 | R 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| § 1. | Kommunal fyrisiting | 11.629 | 11.198 | 431 | 9.925 | 9.707 | 9.822 |
| § 2. | Almanna- og heilsumál | 34.168 | 34.329 | -161 | 30.858 | 29.674 | 29.168 |
| § 3. | Børn og ung | 16.442 | 15.655 | 787 | 14.742 | 14.423 | 11.678 |
| § 4. | Undirvísing | 8.710 | 8.304 | 406 | 8.027 | 7.326 | 6.749 |
| § 5. | Mentan og frítíð | 12.115 | 10.284 | 1.831 | 8.787 | 7.948 | 8.700 |
| § 6. | Teknisk mál | 5.828 | 5.106 | 722 | 5.697 | 5.019 | 4.273 |
| § 7. | Kommunal virki | 5.359 | 3.819 | 1.540 | 3.374 | 2.153 | 2.191 |
| | Rakstur tilsamans | 94.251 | 88.695 | 5.556 | 81.410 | 76.250 | 72.581 |
| **Grein** | **Løgur (tkr.)** | | | | | | |
| § 1. | Kommunal fyrisiting | 350 | 392 | -42 | 287 | 559 | 284 |
| § 2. | Almanna- og heilsumál | 0 | 260 | -260 | 0 | 0 | 0 |
| § 3. | Børn og ung | 2.685 | 2.771 | -86 | 460 | 1.225 | 1.416 |
| § 4. | Undirvísing | 2.405 | 2.692 | -287 | 1.461 | 3.275 | 1.226 |
| § 5. | Mentan og frítíð | 895 | 771 | 124 | 4.568 | 44 | 366 |
| § 6. | Teknisk mál | 12.250 | 7.587 | 4.663 | 5.732 | 11.682 | 12.424 |
| § 7. | Kommunal virki | 5.425 | 1.827 | 3.598 | 3.702 | 6.121 | 2.103 |
| | Løgur tilsamans | 24.010 | 16.299 | 7.711 | 16.210 | 22.907 | 17.819 |
| Rakstur og løgur tilsamans | | 118.261 | 104.994 | 13.267 | 97.620 | 99.157 | 90.400 |
| § 20 | Inntøkur | -90.123 | -103.691 | 13.568 | -98.821 | -96.853 | -91.366 |
| RLÚ (Rakstur, løga og útlán) | | 28.138 | 1.303 | 26.835 | -1.201 | 2.303 | -966 |

**Broytingin er nýtt soleiðis**:

| | |
|---|---|
| Broyting í áogn, peningi og aðrari skuld | 1.835 |
| Broyting í lániskuld | 0 |
| Broyting í gjaldføri | 25.000 |
| | 26.835 |

**Játtan og nýtsla:**

Vísandi til høvuðsyvirlitið í ársroknskapinum fyri 2024 hjá Tvøroyrar kommunu og yvirlitið omanfyri, er nettomeirnýtsla staðfest á einari grein á rakstrarsíðuni. Flestu greinarnar hava minninýtslu í mun til ætlanina. Meirnýtsla er staðfest í Almanna- og heilsumálum. Talan er um 161 tkr. Í løgunum er meirnýtsla staðfest á grein 1, 2, 3 og 4, og er meirnýtslan ávikavist 42 tkr., 260 tkr., 86 tkr. og 287 tkr. Í inntøkunum er staðfest ein meirinntøka á 13.568 tkr.

Vit fara at vísa á, at sambært §41 í kommunustýrislógini, so skal fyriliggja játtan, áðrenn peningur verður brúktur.

**Fíggjarliga gongdin:**

Samlaði raksturin hjá kommununi er í 2024 88.695 tkr., og er nakað væl hægri enn undanfarna ár, tá hann var 81.410 tkr. Hækkingin er á 8,9%. Inntøkurnar hjá kommununi eru á 103.691 tkr. og eru nakað hægri enn undanfarna ár, tá tær vóru 98.821 tkr. Hækkingin er á 4,9%.

Á løgusíðuni hevur kommunan nýtt 16.299 tkr. í 2024 samanborið við 16.210 tkr. í 2023. Størstu løgurnar hava verið gjørdar á hesum økjunum: Barnaansing 1.664 tkr., Fólkaskúlin 2.692 tkr., Umsiting og røkt av fastognum 1.635 tkr., Vegir 4.478 tkr. og Havnir og lendingar 1.625 tkr

**Grannskoðan av aktivum:**

Tøkur peningur
Avstemmanir av pengakontum eru gjøgnumgingnar og samanhildnar við ársyvirlit og kontuavrit frá peningastovnum.

Gjøgnumgongdin av tøkum peningi gav okkum ta fatan, at tøkur peningur verður væl umsitin, og at peningakontur regluliga verða avstemmaðar við kontuavrit frá peningastovnum.

Sambært § 15, stk. 1 í kunngerðini um roknskaparverk kommunanna skulu útgjaldingar fremjast umvegis eina felags kt-útgjaldsskipan hjá kommununi, og tað skal verða gjørligt at skipa munadygt eftirlit í hesi skipan. Kommunan ger elektroniskar gjaldingar gjøgnum Heimagreiðslu/Netbanka. Fyri at eftirlitið við slíkum gjaldingum skal vera nóg gott, er tað ein avgjørd treyt, at eitt fólk ikki einsamalt kann gera hesar flytingar.

15 Í § 16 í kunngerðini um roknskaparverk kommunanna verður eisini ásett, at mannagongdin viðvíkjandi gjaldingum skal verða løgd soleiðis til rættis, at tað starvsfólkaliga verður skilnaður millum skrásetingina og gjaldingina – tað skal verða funktiónskilnaður millum bókhald og pening.

Viðvíkjandi funktiónsskilnaði millum bókhald og pening hevur umsitingin skipað seg soleiðis, at tað altíð eru tveir brúkarar, sum saman gera flytingarnar í netbankanum, harav borgarstjórin, kommunustjórin ella fíggjarleiðarin altíð er annar. Borgarstjórin og nevndarformenninir vátta útreiðsluskjøl saman við tí, sum hevur umbiðið útreiðsluna. Sostatt er treytin um funktiónsskilnað millum pening og bókhald uppfylt.

**Materiell støðisogn**
Íløgur í materiella støðisogn verða ikki aktiveraðar, men førdar beinleiðis yvir raksturin í keypsárinum, sum eisini er í tráð við kunngerðina um roknskaparverk kommunanna.

Kunngerðin um roknskaparverkið hjá kommunum ásetur, at yvirlit skulu gerast yvir ognir sum anlegg, jørð, bygningar, maskinur, før, innbúgv og annan meira virðismiklan útbúnað. Yvirlitini skulu hava upplýsingar um keypsvirðið og broyting í virðismetingini, livitíð umframt hava aðrar upplýsingar, sum hava týdning fyri fyrisitingina. Keyp yvir 50 tkr. skulu altíð verða skrásett í búskaparskipanini (bókhaldinum) hjá kommununi.

Í sambandi við grannskoðanina hava vit staðfest, at ognirnar eru við í fíggjarbókhaldinum hjá kommununi. Tilgongd og frágongd eru førd í ognaryvirlitið, og avskrivingar eru gjørdar. Tað er íkomin ein munur millum bókhaldsskipanina og búskaparskipan landsins við tað at til- og frágongd í 2023 og 2024 ikki er tikin við í búskaparskipan landsins umframt eisini avskrivingarnar í 2024. Vit heita á kommununa, um at fáa hetta rættað í 2025. Eisini vilja vit heita á kommununa um at gera eina meira systematiska avskriving av ognunum, undantikið jørð.

**Skattaeftirstøður og millumrokningar við Føroya Gjaldstovu**
Vit hava avstemmað skattaeftirstøðurnar og millumrokningar við Føroya Gjaldstovu. Vit hava staðfest, at skattaeftirstøðurnar og skattainntøkurnar verða rætt periodiseraðar og stemma. Í hesum sambandi skulu vit vísa á, at pr. 01.01.2024 vóru avsettar 1.796 tkr. móti tapi uppá skattaeftirstøður.

Hendan upphædd er pr. 31.12.2024 2.187 tkr., ein hækking uppá 391 tkr. Hesar 391 tkr. hava skapt eina meirútreiðslu í skattinum uppá somu upphædd.

**Skuldarar**
Skuldararnir eru gjøgnumgingnir saman við bókhaldara og ábyrgdarhavandi fyri innkrevjing v.m., og mett er um tapsvanda av hvørjum einstøkum skuldara. Avsetingin er 550 tkr. líka sum undanfarna ár. Mett verður, at avsetingin er nøktandi.

Okkara gjøgnumgongd vísti, at økini vóru í lagi, og hava vit ikki aðrar viðmerkingar enn tær, sum eru lýstar.

**Grannskoðan av passivum**

Útjavningarkonta
Útjavningarkontan primo er avstemmað við ársroknskapin fyri 2023.

Lán og kassakredittur
Lán og kassakredittur eru samanhildin við ársyvirlit frá peningastovni, og hesi stemma.

Ognarar
Ognararnir eru gjøgnumgingnir við, at vit við stakroyndum hava kannað, um teir verða avstemmaðir regluliga, ella at saldan er sannlíkisgjørd. Mett er, at tað sum heild er í lagi, tó vilja vit mæla til, at kontur, har saldan er farin í debet, verða gjøgnumgingar so skjótt sum møguligt, og møguligar rættingar gjørdar har tað krevst.

Í sambandi við grannskoðanina av 2024 og undanfarin ár er staðfest, at kommunan hevur nakað av millumverandi við Nærverkið/Almannaverkið, sum partarnir ikki eru samdir um. Vit vilja mæla til, at avtala verður fingin ímillum partarnar, soleiðis at hetta kann avgreiðast endaliga.

Samlað skuld í mun til álíkning
Niðanfyri er eitt yvirlit yvir nettoskuld í mun til álíkning:

| **Gongd útjavningarkonto/nettoskuld og lániloft árini 2020 - 2024** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | **2024** | **2023** | **2022** | **2021** | **2020** |
| ***Útjavningarkonto/nettosskuld*** | ***38.258*** | ***36.955*** | ***38.156*** | ***35.850*** | ***36.815*** |
| ***Lániloft (nýggja) t.kr.*** | | | | | |
| Kommunuskattur inntøka | 75.954 | 72.935 | 71.223 | 67.967 | 65.571 |
| Kommunuskatta % | 20,9% | 20,90% | 20,90% | 20,90% | 20,90% |
| ***Álíkning umroknað 23%*** | ***83.586*** | ***80.263*** | ***78.379*** | ***74.796*** | ***72.159*** |
| Skattur eftirlønargjald | 23.207 | 21.049 | 0 | 0 | 0 |
| Afturbering DIS, FAS o.a. | 4.845 | 4.895 | 0 | 0 | 0 |
| ***Lániloft (nýggja) t.kr.*** | ***111.638*** | ***106.207*** | ***78.379*** | ***74.796*** | ***72.159*** |
| ***Nettoskuld %*** | ***34%*** | ***35%*** | ***49%*** | ***48%*** | ***51%*** |
| ***Lánimøguleikar*** | **73.380** | **69.253** | **40.224** | **38.946** | **35.344** |

Álíknaður skattur og nettoskuld eru roknað út eftir leiðreglum hjá Fíggjarmálaráðnum. Í 2023 blivu reglurnar viðvíkjandi útrokning av nettoskuld í mun til álíkning broyttar, soleiðis at frameftir eisini verður tikið hædd fyri tí, sum kommunan fær viðvíkjandi skatti av eftirlønargjøldum og afturbering av DIS, FAS o.a.

Nettoskuldin í mun til álíkning er við árslok 2024 34% av einari álíkning. Lánimøguleikarnir hjá kommununi eru tískil við árslok 2024 umleið 73 mió. kr.

Okkara gjøgnumgongd vísti, at økini vóru í lagi, og hava vit ikki aðrar viðmerkingar enn tær, sum eru lýstar.

**Grannskoðan av rakstrarroknskapi**

Skattainntøkur
Skattainntøkurnar eru gjøgnumgingnar, og tær samsvara við uppgerð frá Føroya Gjaldstovu.

Niðanfyri er eitt yvirlit yvir inntøkurnar síðstu 5 árini:

| *(1.000 kr.)* | **2024** | **2023** | **2022** | **2021** | **2020** |
|---|---|---|---|---|---|
| Roknskapur | 78.997 | 75.556 | 74.256 | 70.020 | 68.315 |
| Ætlan | 68.510 | 70.469 | 65.581 | 64.380 | 61.572 |
| Munur | 10.487 | 5.087 | 8.675 | 5.640 | 6.743 |
| Skattaprosent | 20,9% | 20,90% | 20,90% | 20,90% | 20,90% |
| | | | | | |
| Manntal | 1.732 | 1.747 | 1.767 | 1.771 | 1.747 |
| Inntøka pr. fólk | 45,6 | 43,2 | 42 | 39,5 | 39,1 |
| | | | | | |
| Inntøka umroknað til skattskyldug | 377.976 | 361.512 | 355.292 | 335.024 | 326.866 |
| Inntøka pr. fólk | 218 | 207 | 201 | 189 | 187 |
| Broyting í árinum | 5,46% | 2,92% | 6,29% | 1,11% | 4,79% |

Útreiðslur og inntøkur
Vit hava gjøgnumgingið útreiðslu- og inntøkukontur, eins og vit við stakroyndum hava skjalagrannskoðað útvaldar bókingar, har kannað er eftir, at skjalprógv er nøktandi, at skjølini eru váttað og at rætt er bókað. Harumframt eru greiningar gjørdar.

Íløgur
Tvøroyrar kommuna hevur gjørt íløgur á tkr. 15.129 í árinum, og vísa vit í talvuni á síðu 282, hvar hesar íløgur eru gjørdar.

Rentur
Rentuinntøkur og rentuútreiðslur eru samanhildnar við tilskrivaðar rentur sambært ársyvirlitum og kontuavritum frá peningastovnum og lángevarum.

Bú- og Heimatænastan
Í sambandi við grannskoðanina av 2024 er staðfest, at endaligur ársroknskapur fyri 2024 ikki fyriliggur fyri Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy. Útreiðslurnar, sum kommunan hevur bókað á rakstrarstaðið samsvara við uppgerðina, sum fyriliggur fyri 2024 hjá Bú- og Heimatænastuni. Sambært uppgerðini er kostnaðurin hjá Tvøroyrar kommunu fyri 2024 hjá Bú- og Heimatænastuni 27.139 tkr. Í fíggjarætlanini fyri 2024 vóru avsettar 26.621 tkr.

Undir onnur stuttfreistað skuld hjá Tvøroyrar kommuna eru 556 tkr., sum viðvíkja Bú- og Heimatænastuni. Talan er um lønarskuld, sum íkom av broyting í roknskaparhátti viðvíkjandi tíðaravmarking av lønum fyrsta árið, eldraøkið varð lagt til kommunurnar. Broytingin var á 1.702 tkr., harav parturin hjá Tvøroyrar kommunu var 556 tkr., sum vóru tiknar við í fíggjarstøðuna sum onnur stuttfreistað skuld og samstundis yvir útjavningarkontuna. Broytingin var gjørd til tølini í 2016. Staðfest er, at hetta er óbroytt í 2024.

Okkara gjøgnumgongd vísti, at økini vóru í lagi, og hava vit ikki aðrar viðmerkingar enn tær, sum eru lýstar.

Aðrar viðmerkingar
Vit hava lisið fundarbøkurnar hjá kommununi til og við fundin 1. mai 2025 hjá býráðnum og 24. apríl 2025 hjá fíggjarnevndini.

Mannagongdir og innanhýsis eftirlit
Í protokollum undanfarnu árini hava vit víst á, at rapporteringin av tølum úr bókhaldinum til Fíggjarmálaráðið hevur verið ov sein. Vit hava í sambandi við grannskoðanina av 2024 staðfest, at 2 av tíðarskeiðunum í 2024 standa at vera innrapporterað innan ásettu freistina, meðan restin eru innrapporterað ov seint til Fíggjarmálaráðið. Krøvini til innrapporteringina eru í § 10 í kunngerðini um roknskaparverk kommunanna, har sagt verður, at innrapporterast skal í seinasta lagi ein mánað eftir lokið tíðarskeið.

KT/Persóndata Í sambandi við at kommunan og nevndirnar hava ymsar upplýsingar um borgarar og starvsfólk skrásettar talgilt, vilja vit vísa á nýggju lógina um dátuvernd frá 7. juni 2020, nr. 80, sum er komin í gildi. Krøvini í lógini eru galdandi frá 1. januar 2021. Vit hava fingið upplýst, at kommunan hevur gjørt nógv við hetta, og kann metast at vera komin langt, tó ikki heilt á mál.

Annars vilja vit vísa á, at tað er av stórum týdningi, at kommunan hevur dagførdar skrivligar mannagongdir og politik um KT. Vit mæla til at KT-politikkur og -mannagongdir javnan verða endurskoðað og dagførd eftir tørvi

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður roknskapurin fyri 2024 latin fíggjarnevndini og býráðnum til støðutakan.

1. Vísandi til § 46 í kommunustýrislógini verður roknskapur og grannskoðanarprotokoll løgd fyri fíggjarnevndina at góðkenna. *Um fíggjarnevndin ongar viðmerkingar hevur, beinir nevndin roknskapin og protokollina í býráðið at viðgera/góðkenna.*

2. Býráðið skal eisini taka støðu til val av grannskoðara fyri ár 20254.
   Greinin er soljóðandi: *"Í samband við góðkenning av ársroknskapinum skal kommunustýrið taka støðu til, um grannskoðarin skal halda áfram, ella um ein annar skal verða valdur. Stk. 2. Til tess at loysa grannskoðaran úr starvi krevst loyvi frá landsstýrismanninum"*

**<u>Fíggjarnevndin 19. juni 2025:</u>**
Fíggjarnevndin mælir einmælt til at samtykkja roknskapin samsv. tilmælið hjá fíggjarleiðara, kommunustjóra og borgarstjóra sum fyriliggjandi, og at grannskoðarafelagi Januar heldur fram sum grannskoðanfelag. -Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 26. juni 2025:**

Býráðið samtykkir einmælt roknskapin 2024, og at grandskoðarfelagið Januar heldur fram sum grandskoðarfelag hjá Tvøroyrar kommunu.

**45/25**
**25/00191-2 Mýrifípan -barnaansing tíðliga á morni (kl. 06.30)**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 21.05.2025 | 24/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.05.2025 | 57/25 |
| 3 Sosiala nevnd | 18.06.2025 | 30/25 |
| 4 Fíggjarnevndin | 19.06.2025 | 66/25 |
| 5 Býráðið | 26.06.2025 | 45/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 05.05.2025**
Forkv. í Sosialu nevnd, hevur móttikið teldupost frá borgara við áheitan um, hvørt kommunan kann endurskoða nær barnaansingin í Mýrifípuni byrjar á morgni.

Skriva verður ma. at:
*Nú havi eg og fleiri við mær eitt arbeiði við skeivum arbeiðstíðum, tað vil siga, at vit byrja at arbeiða kl.7 á morgni og er tað ein trupulleiki at sleppa til arbeiðis hendan tíman, tí barnagarðurin er stongdur og opnar ikki fyrr enn kl.7.30.*

*Tí hugsaði eg, um tað ikki kann vera ein møguleiki hjá Tvøroyrar kommunu at bjóða okkum borgarum, ið hava hesa arbeiðstíð eina ansing til okkara børn kl.6.30 bert teir dagar, ið man hevur brúk fyri tí.*

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
ókent

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 21. maj 2025:**
Málið verður útsett til næsta fund, tá leiðarin av Mýrifípuni møtur at greiða nærri frá ynskinum at hava opið tíðliga á morgni.

**Fíggjarnevndin 26. maj 2025:**
Málið verður útsett til ein seinni fund.

**Sosiala nevnd 18. juni 2025:**
Kari Joensen, leiðari av barnagarðinum Mýrifípan møtti til fundin at greiða frá um tørv og arbeiðsætlan fyri slíka tænastu, har barnagarðurin letur upp kl. 06.30. Kari Joensen upplýsir, at um kommunan ynskir at veita hesa tænastuna, er neyðugt, at eitt starvsfólk møtur til arbeiðs 15. min áðrenn barnagarðurin letur upp og næsta starvsfólk møtir kl. 06.30. Kari Joensen mælir til, at kommunan kann skipa hesa tænastu,

sum eina royndarskipan, ið t.d. kann byrja frá 4. august og árið út, tá støða verður tikin til at endurskoða tænastuna. Forkv. í Sosialu nevnd mælir til at taka undir við tilmælinum hjá Kari Joensen, og at gjaldið fyri hesa tænastuna, ikki broytir ansingargjaldið. -Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2025:**

Einmælt samtykt tilmælið hjá Sosialu nevnd. -Málið verður beint í býráðið

**Býráðið 26. juni 2025:**

Barbara Tausen var ikki við í viðgerðini. Forkv. í sosialu nevnd greiddi frá um ætlanina. Býráðið samtykkir einmælt tilmælið hjá Sosialu nevnd og fíggjarnevndini at skipa fyri barnaansing tíðliga á mornni kl. 06.30, sum eina royndarskipan fram til 31.12.2025.

**46/25**
**25/00235-2 FSR -Umsókn umstuðul til rakstur av nýggja neystinum á Hvítanes**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 18.06.2025 | 62/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.06.2025 | 71/25 |
| 3 Býráðið | 26.06.2025 | 46/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 6. Juni 2025**
Umsitingin hevur móttikið teldupost -dagf. 5. Juni- frá forkv. FSR, Kristinu Roest, ið ma. skrivar:

*Góðan dagin tit. Vísandi til stuðulsavtaluna millum Tvøroyrar Kommunu og FSR vil eg vegna FSR spyrja Tvøroyrar Kommunu um stuðulin til rakstur av kappróðrarneystinum.*

*Tørvurin fyri reingerð byrjar tí nú at blíva sera átroðkandi. Haraftrat verða wc kummur monteraðar í komandi viku. Ein høvuðsreingerð er bíløgd til áðrenn Jóansøku.*

*Aftrat hesum hevur felagið tær føstu útreiðslurnar hvønn mánaða, sum vit í løtuni sjálvi dekka. Eg meti tað tí verða sera átroðkandi, at felagið fær útloyst stuðulin til rakstur av bygninginum skjótast gjørligt.*

*Viðvíkjandi upphæddini, so verður víst til stuðulsavtaluna.*

**Stuðulsavtalan:** *(Fíggjarligur verkætlanarstuðul til bygging av kappróðrarneysti)*

Tvøroyrar kommunu og FSR, Froðbiar Sóknar Róðrarfelag hava undirskriva stuðulsavtalu har í ásett er:

**Rakstur**
**§ 7.a)** Tvøroyrar kommuna viðgerð umsókn um rakstrarstuðul av neystinum á hvørjum árið.
**b)** Samb. rakstraræltan gjørda av FSR, dagf. 24.10.2020, er rakstraræltanin fyri ár 2021 mett til kr. kr. 182.880,-, og hækkar henda líðandi til kr. 253.380,- í 2030.

**Kommunustjórin viðmerking:**
Mælt verður mentanarnevndini til at viðgerða áseting á §1 í fyri liggjandi stuðulsavtalu í hesum sama sambandi.

**Stuðulsveiting**
**§ 1.a)** Tvøroyrar kommuna stuðlar FSR í árinum 2020 við kr. 3.500.000,- til bygging av kappróðrarneystið á Hvítanesi (partur av matr. nr. 267).
**b.)** Tvøroyrar kommuna hevur frammanundan stuðlað FSR í 2019 við á kr. 500.000,- til sama endamál.
**c.)** Tvøroyrar kommuna letur uttan kostnað part av matr. nr. 267 til FSR sum grundøkið til bygging av kappróðrarneystið.
**d.)** Um FSR hevur tørv á meira stuðul, verður hetta viðgjørt fyri seg, og hesin sáttmálin verður dagførdur hareftir.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongin játtan avsett á FÆ2025

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 18. juni 2025:**
Forkv. mælir til at lata ein stuðul á kr. 25.000,- av §524, »stuðul til ítrótt» oyramerkt sum fyribils rakstur av nýggja neystinum á Hvítanesi til 31.12.2025. Málið verðir tikið upp til nýggja viðgerð, tá neystið stendur liðugt.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Mentanarnevndini.

**Býráðið 26. juni 2025:**
Býráðið samtykkir einmælt tilmælið hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini at veita ein stuðul á kr. 25.000,- av §524, »stuðul til ítrótt» oyramerkt sum fyribils rakstur av nýggja neystinum á Hvítanes til 31.12.2025. Og at málið verðir tikið upp til nýggja viðgerð, tá neystið stendur liðugt.

**47/25**
**25/00250-1 Bilur til gartnarin**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 16.06.2025 | 21/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.06.2025 | 74/25 |
| 3 Býráðið | 26.06.2025 | 47/25 |

**Málslýsing:** Kommunustjórin 13.06.2025
Mælt verður til at kommunan útvegar ein vørubil til gartnarin, sum kann rúma amboð til røkt av grønum økjum kring um í allari kommununi, og sum gevur gartnaranum frítt at far uttan at verða bundin av flutningi.

Kommunan hevur móttikið tilboð uppá vørubil:
1.5TDCi 100hk Man.gear, hvítur, kamera, p-sensor høgru skjótihurð o.m.a. Komplett rustverja írokanð

Útgjald : 30.000,-
Mðr gjald í 5 ár : 3.340,-
Restgjald eftur 5 ár (og tá eigur kommunan bilin) : 70.000,-

Um bilurin verður keyptur beinanvegin, kann hesin útvegast fyri: 295.000,- v/mvg her av er mvg : 49.500,-

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:** Onki játtan er avsett á FÆ2025 §629 "Maskinur & bilar". Mælt verður til at fíggja keypið av §619 "bygging og løguframleiðsla kirkjugarður", sum eisini er virkisøkið hjá grøna toyminum.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Teknisku nevnd og býráðnum til støðutakan.

**Tekniska nevnd 16. juni 2025:**
Nevndin mælir til at taka av tilboðnum. Málið verður beint víðari í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Teknisku nevnd. Heitt verður á umsitingina í hesum sambandi um eisini at kanna, hvørt bilurin, sum bleiv keyptur til umsitingina kann útskiftast við ein vøru bil.

**Býráðið 26. juni 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Teknisku nevnd og fíggjarnevndini.

## 48/25
## 25/00212-2 GIGNI -áheitan um at fáa skipanina við heilsufrøðingi í Tvøroyrar skula at virka samsv. áseting.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 21.05.2025 | 19/25 |
| 2 Sosiala nevnd | 18.06.2025 | 27/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.06.2025 | 67/25 |
| 4 Býráðið | 26.06.2025 | 48/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 21.05.2025**
Skúlastýrið hevur sent skriv til umsitingina, við áheitan um at senda skriv til GIGNI:

Vegna skúlastýrið í Tvøroyrar skúla og Tvøroyrar kommunu, velja vit enn einaferð at koma við einari inniligari áheitan til tykkum, um at betra um viðurskiftini hjá okkara skúlanæminum samsv. fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 30. apríl 2018

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 21. maj 2025:**
Einmælt samtykt at senda skriv, ið er orða av skúlastýrinum til GIGNI við avrit til Barna- og Útbúgvingarmálaráðið og Heilsumálaráðið addresera til landstýriskvinnuna. Avsendari av skrivinum verður Tvøroyrar Skúli, Skúlastýrið og Tvøroyrar kommuna.

**Kommunustjórin 12. juni 2026**
Umsitingin hevur sent skriv til Barna- og Útbúgvingarmálaráðið og Heilsumálaráðið addresera til landstýriskvinnuna, og hevur GIGNI og stjórin á Heilsutrygd svara við fráboðan um, at tey ynskja fund við kommununa at umrøða støðuna.

**Kommunustjórin 16.06.2025:**
Fundur varð í dag við GIGNA og Heilsutrygd, og er fundarfrág. 25/00212-8 viðløgd málinum.

**Sosiala nevnd 18. juni 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað, og fundarfrágreiðingin frá fundinum 16. juni við GIGNI og Heilsutrygd bleiv tikin til eftirtektar.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað, og fundarfrágreiðingin frá fundinum 16. Juni við GIGNI og Heilsutrygd verður til eftirtektar.

**Býráðið 26. juni 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað, og fundarfrágreiðingin frá fundinum 16. Juni við GIGNI og Heilsutrygd verður til eftirtektar.

**49/25**
**25/00176-1 Heilsudepil á Tvøroyri -læknamiðstøð fyri alla Suðuroynna**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.04.2025 | 35/25 |
| 2 Býráðið | 01.05.2025 | 31/25 |
| 3 Sosiala nevnd | 21.05.2025 | 22/25 |
| 4 Fíggjarnevndin | 26.05.2025 | 44/25 |
| 5 Býráðið | 02.06.2025 | 39/25 |
| 6 Sosiala nevnd | 18.06.2025 | 28/25 |
| 7 Fíggjarnevndin | 19.06.2025 | 64/25 |
| 8 Býráðið | 26.06.2025 | 49/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 22.04.2025**
Umsitingin hevur arbeitt við ætlan um hvussu Tvøroyrar kommuna kann loysa avbjóðingarnar viðv. verandi heilsudeplinum á Tvøroyri. Tvøroyrar býráðið samtykti hin 27. februar 2025, at heimila umsitingini at arbeiða víðari við ætlan um at byggja nýggja kommunulæknamiðstøð á Tvøroyri. Ætlanin tekur støði í tørvslýsingini hjá virkandi kommunulæknum, sum vísa á, at tørvur er á einari læknamiðstøð fyri alla Suðuroynna.

Eisini hevur løgtingið samtykt nýggja lóggávu "Løgtingslóg um at skipa heilsutænastur í nærumhvørvinum hjá borgaranum"

**Í nýggju lóggávuni er ma. ásett:**

***Kapittul 1, Heilsutænastur og heilsuøkir***
***§ 1.*** *Landsstýrisfólkið skipar landið í heilsuøkir, ásetur nærri reglur um tal á heilsuøkjum og hvussu hesi landafrøðiliga verða skipað.*

***§ 2.*** *Heilsutænastur frá kommunulækna og øðrum heilsustarvsfólki verða veittar borgarum í heilsuøkinum, undir hesum kanningar, viðgerð, heilsufremjandi og sjúkufyribyrgjandi tilboð og ráðgeving.*

***§ 3.*** *Í hvørjum heilsuøki kring landið verða skipaðar ein ella fleiri heilsumiðstøðir, sum eru høli, har heilsutænastur í nærumhvørvinum, sambært hesi løgtingslóg, verða veittar.*
*Stk. 2. Landsstýrisfólkið tekur, í samráð við kommunurnar í heilsuøkinum, avgerð um staðseting og tal á heilsumiðstøðum í heilsuøkinum.*
*Stk. 3. Landsstýrisfólkið ásetur harumframt nærri reglur um innihaldið í heilsumiðstøðum, m.a. reglur um tænastur, dygdarkrøv, starvskrøv og reglur um kunningartøkni.*

***§ 4.*** *Kommunurnar í heilsuøkinum útvega og viðlíkahalda hølir til heilsutænastur í nærumhvørvinum, samanber § 3.*

*§ **5.** Kommunurnar í heilsuøkinum senda í felag uppskot til landsstýrisfólkið um antin at byggja hølir, umbyggja ella útbyggja verandi hølir ella leiga hølir, undir hesum uppskot til at innrætta og staðseta hølir. Stk. 2. Metir landsstýrisfólkið, at tørvur er á at útvega hølir til heilsutænastur í nærumhvørvinum sambært hesi løgtingslóg ella víðka um verandi hølir, kann landsstýrisfólkið heita á kommunurnar í heilsuøkinum um at senda sær uppskot um bygging, umbygging ella útbygging ella uppskot um leigumál.*

*§ **6.** Landsstýrisfólkið góðkennir øll byggimál, umbyggingarætlanir og útbyggingarætlanir og leigumál, undir hesum uppskot til at innrætta hølini. Stk. 2. Landsstýrisfólkið er við í verkætlanini frá hugskotsuppriti til góðkenning. Heilsutrygd er við í verkætlanini frá tí, at góðkent er, til hølini verða tikin í nýtslu.*

*§ **7.** Kommunurnar rinda fyri at byggja, umbyggja ella útbyggja hølir til heilsutænastur í nærumhvørvinum. Somuleiðis rinda kommunurnar fyri at leiga hølir.*

*§ **8.** Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur byggimálum viðvíkjandi og um støðið á hølum til heilsutænastur í nærumhvørvinum.*

*§ **9.** Kommunurnar í heilsuøkinum útvega innbúgv til hølir til heilsutænastur í nærumhvørvinum. Kommunurnar rinda kostnaðin av hesum. Stk. 2. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um, hvat innbúgv talan er um sambært stk. 1. Landsstýrisfólkið ásetur eisini nærri reglur um rakstur og viðlíkahald av innbúgvi.*

*§ **10.** Heilsutrygd útvegar tól og amboð til hølir til heilsutænastur í nærumhvørvinum sambært hesi løgtingslóg. Landið rindar kostnaðin av tólum og amboðum. Stk. 2. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um, hvørji tól og amboð talan er um sambært stk. 1. Landsstýrisfólkið ásetur eisini nærri reglur um rakstur, viðlíkahald og eftirlit við tólum og amboðum.*

**Í uppskot til nýggja kunngerð um at um at skipa landið í heilsuøkir og staðseta heilsumiðstøðir er ásett:**

§ 1. Landið verður skipað í 5 heilsuøkir:
1) Heilsuøki 1: Fugloyar kommuna, Viðareiðis kommuna, Kunoyar kommuna, Hvannasunds kommuna, Klaksvíkar kommuna, Eysturkommuna og Fuglafjarðar kommuna.
2) Heilsuøki 2: Runavíkar kommuna, Nes kommuna og Sjóvar kommuna.
3) Heilsuøki 3: Sørvágs kommuna, Vága kommuna, Vestmanna kommuna, Kvívíkar kommuna, Sunda kommuna, Eiðis kommuna og Tórshavnar kommuna (bert Kollafjørður, Signabøur og Oyrareingir).
4) Heilsuøki 4: Tórshavnar kommuna (undantikið Kollafjørður, Signabøur og Oyrareingir), Skopunar kommuna, Sands kommuna, Skálavíkar kommuna, Húsavíkar kommuna og Skúvoyar kommuna.
**5) Heilsuøki 5: Hvalbiar kommuna, Tvøroyrar kommuna, Fámjins kommuna, Hovs kommuna, Porkeris kommuna, Vágs kommuna og Sumbiar kommuna.**

§ 2. Í heilsuøkjunum verða staðsettar ein ella fleiri heilsumiðstøðir.

5) Heilsuøki 5: heilsumiðstøðin staðsett á Tvøroyri verður nevnd Heilsumiðstøðin á Tvøroyri og heilsumiðstøðin staðsett í Vági verður nevnd Heilsumiðstøðin í Vági.

§ 3. Henda kunngerð kemur í gildi 1. Juni 2025.

Virkandi kommunulæknar upplýsa í skrivi dagf. 29.01.2025 til borgarstjórar í Suðuroynni.

*Eina nýggj læknamiðstøð fyri alla oynna. Læknarnir eru samdir um, at fyri at betra um umstøðurnar, skal ein nýggj læknamiðstøð fyri alla oynna byggjast. Tað er ikki nøktandi at betra um og útbyggja núverandi læknamiðstøðir í Vági ella á Tvøroyri. Nógvir fyrimunir eru við, at læknarnir arbeiða undir einum taki: - Fleiri starvsfelagar, ið skapar eitt spennandi, áhugavert og mennandi arbeiðspláss. - Tað lættir um tungu arbeiðsbyrðuna, tá fleiri eru at lyfta uppgávuna. - Tað verður lættari hjá læknunum at fáa møguleika at fara á skeið og halda frí, tí fleiri læknar kunnu traðka til. - Møguleiki fyri felags undirvísing/endurútbúgving og menning, tá fleiri starvsfólk eru. - Møguleiki fyri at samstarva um dýr tól, t.d. ultraljóð apparat og EKG. - Felags høli til konferensur, felags undirvísing og skeið. - Møguleiki fyri at fáa fleiri útbúgvingarlæknar í starv, sum gevur eitt fjølbroytt og stimbrandi arbeiðsumhvørvi*

**Lógargrundarlag:**
"Løgtingslóg um at skipa heilsutænastur í nærumhvørvinum hjá borgaranum" -og
Løgtingslóg um kommunulæknaskipan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 6. mai 2015

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ókent

**Tilmælið:**
Umsitingin mælir til, at arbeitt verður víðari við ætlan hjá Brim, ark. v/Páll Holm Lave, um bygging av heilsudepli á Tvøroyri, ið kann rúma tørvin fyri alla Suðuroynna, samsv. lóggávu.

Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 25. april 2025:**
Fíggjarnevndin samtykkir einmælt at arbeiða víðari við uppskotinum hjá BRIM Arkitektum, og at bjóða umboð fyri læknum og starvsfólki til ein kunnandi fund um uppskotið.

**Býráðið 01. maj 2025:**
Varaborgarstjórin kunnaði um málið.

**Sosiala nevnd 21. maj 2025:**
Málið var umrøtt og kunna. Sosiala nevnd mælir einmælt til at taka undir við fyriliggjandi uppskotið hjá BRIM, og at ætlanin verður sent til Heilsumálaráðið til kunnig. Sosiala nevnd mælir einmælt til at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevndin 26. maj 2025:**
Fíggjarnevndin mælir til, at Sosiala nevnd, bjóðar landstýriskvinnuni í heilsumálum á fund á Tvøroyri, at viðgerða nýggja heilsudepilin á Tvøroyri. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 02. juni 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini.

**Kommunustjórin 16.06.2025:**
Tvøroyrar, Hvalbiar og Fámjins kommuna hevði í dag vitjan av landsstýriskvinnuni í heilsumálum og embætisfólkum úr Heilsumálaráðnum. Fundurin varð hildin í býráðssalinum á Tvøroyri í sambandi við

eina felags áheitan frá kommununum í norðaru helvt av Suðuroynni – Tvøroyrar-, Hvalbiar- og Fámjins kommunu – um at byggja ein nútímans heilsudepil á Tvøroyri. Páll Lave frá BRIM arkitektum legði fram uppskot til Heilsudepil.

Víst varð á endamálið við heilsudepilinum at:

- Lúka lógarásettu krøvini til ein nútímans Heilsudepil.
- Nøkta ítøkiligan tørv og ynski hjá kommunulæknum og heilsustarvsfólkum í økinum.
- Veita trygga og góða heilsutænastu til borgarar í øllum kommunum.

Fundurin varð bæði **góður og konstruktivur**, har kommunurnar løgdu fram ítøkiligar ætlanir við grundgeving og tørvsmetingum, grundaðar á:

- Fagligar upplýsingar frá heilsustarvsfólkum.
- Tøkniligar og lógarviðkomandi ásetingar.
- Langsiktaðan tørv á einum heilsudepli, sum kann tæna økinum í nógv ár framyvir.

Sagt bleiv, at Tvøroyri er av kommununum mett sum best hóskandi stað til at byggja ein nútímans heilsudepilin, bæði við atliti til verandi infrastruktur og sum miðsavningarstað fyri Suðuroynna.

Niðurstøðan av fundinum bleiv, at Kommunurnar síggja fram til:

- Halda fram við einum opnum og virknum samskifti við Heilsumálaráðið um ætlanina.
- Røkka á mál við ætlanini at byggja ein heilsudepil, sum nøktar tørvin í nógv ár framyvir.
- Lata upp fyri næsta stig – eitt nú politiskari viðgerð, verkætlanararbeiði, møguligum fíggingarmøguleikum og samskipan við Landið.

Mælt verður til at heimila borgarstjóra og umsitingini at halda áfram við fyriliggjandi ætlan at byggja ein heilsudepil, samsv. uppskot hjá BRIM arkitektum.

**Sosiala nevnd 18. juni 2025:**
Forkv. í Sosialu nevnd mælir til at heimila borgarstjóra og umsitingini at halda áfram við fyriliggjandi ætlan at byggja ein heilsudepil, samsv. uppskot hjá BRIM arkitektum. -Einmælt samtykt

**Fíggjarnevndin 19. juni 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá sosialu nevnd, at heimila borgarstjóra og umsitingini at halda áfram við fyriliggjandi ætlan at byggja ein heilsudepil, samsv. uppskot hjá BRIM arkitektum. -Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 26. juni 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá sosialu nevnd og fíggjarnevndini, at heimila borgarstjóra og umsitingini at halda áfram við fyriliggjandi ætlan at byggja ein heilsudepil, samsv. uppskot hjá BRIM arkitektum.

**50/25**
**25/00218-2 Apotekið -fyrisp. um hølir**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 02.06.2025 | 43/25 |
| 2 Sosiala nevnd | 18.06.2025 | 29/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.06.2025 | 69/25 |
| 4 Býráðið | 26.06.2025 | 50/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 28.05.2025**
Umsitingin hevur móttikið fyrisp. frá landsapotekaranum, um Tvøroyrar kommuna hevur hølir, sum Apotekið kann leiga í eitt tíðarskeið, meðan umvælingar verða gjørdar á verandi Apoteksbygning undir Heygnum 4.

Landsapotekarin upplýsir, at trupulleikar eru við soppavøkstri á apotekinum undir Heygnum 4. Landsverk er innyvir, og Heilsumálaráðið er kunnað. Á fundi við HMR, bleiv avgjørt, at landsapotekarin skal spyrja kommununa um hon kann hjálpa apoteksverkinum.
Brúk er fyri umleið 400 – 500 fermetrum til handil og kontór/matstovu og goymslurúm.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið teknisku nevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 02. juni 2025:**
Kristin Michelsen borgarstjóri kunnar um, at umsitingin hevur havt fund við umboð við Apoteksverkið í dag 2. juni, um tørvin hjá apotekinum at leiga hølir. Kunna bleiv um, at Apoteksverkið var vitandi um, at kommunan eigur bygningin á Sjógøtu 2. og at áhugi er fyri at leiga henda bygningin. Borgarstjórin mælir til, at umsitingin fær heimild til at samráðast við Apoteksverkið um møguligar loysnir. -Einmælt samtykt.

**Kommunustjórin 12. juni 2025**
Umsitingin hevur tann 3. juni 2025 sent eitt skriv til Heilsumálaráðið, adressera til landsstýriskvinnuna, har greitt verður frá ætlanini at byggja ein nýggjan heilsudepil á Tvøroyri. Í svarskrivinum frá Heilsumálaráðnum, dagfest 12. juni, verður upplýst, at ráðið ynskir fund við kommununa fyri at umrøða ætlanina nærri.

Í sama skrivinum hevur kommunan eisini kunnað Heilsumálaráðið um støðuna hjá Apotekinum á Tvøroyri. Landsapotekarin hevur vent sær til Tvøroyrar kommunu við fyrispurningi um, hvørt kommunan hevur hølir, sum Apoteksverkið kann leiga, orsakað av álvarsamum soppavøkstri í verandi bygningi undir Heygnum 4, sum nú verður mett at vera heilsuskaðiligur at uppihalda seg í.

Apoteksverkið hevur upplýst, at tey meta at hava tørv á hølum fyribils í 1–2 ár, meðan verandi apotek verður umvælt. Eftir ein innleiðandi fund við Landsapotekaran, Landsverk og starvsfólkini á Apotekinum er stórur áhugi fyri at leiga fyrrverandi avgreiðsluhølini hjá Posta á Sjógøtu 2 – ein bygningur, sum Tvøroyrar kommuna eigur, og sum annars er ætlaður til móttøku og býarbókasavn o.a.

Kommunan er jalig fyri at hjálpa Apoteksverkinum úr teirra trupulleikum, og ynskir at leiga út fyrv. Posta avgreiðsluna á Sjógøtu 2 í eitt styttri tíðarskeið. Samstundis hevur kommunan kunna Apoteksverkið um ætlanina at byggja ein nýggjan heilsudepil á Tvøroyri, sum kommunan hevur boðið Apoteksverkinum innivist í. Apoteksverkið arbeiðir saman við Landsverk fyri at staðfesta, hvussu umfatandi umvælingarnar á bygningin undir Heygnum 4 eru, hvussu langa tíð hesar fara at taka, og hvussu stórur fíggjarligi kostnaðurin væntandi verður. Kommunan hevur í hesum sambandi mælt pørtunum til, eisini at meta um, hvørt tað kann vera skilabetri at byggja nýtt heldur enn at umvæla gamla bygningin.

Umsitingin mælir sosialu nevndini – og møguliga býráðnum umvegis fíggjarnevndina – til at taka støðu til, um hølini á Sjógøtu 2 skulu leigast út til Apoteksverkið sambært fyriliggjandi leigusáttmála, og harvið útseta samtyktina hjá Tvøroyrar býráð at staðseta móttøku, kunningarstovu og býarbókasavn í bygninginum.

Fyriliggjandi uppskot til leigusáttmála við Apoteksverkið er í fyrstu syftu galdandi í eitt ár, við møguleika at leingja hann fram til endan av 2026, tá ein nýggj og varandi loysn væntandi verður klár hjá Apoteksverkinum.

**Sosiala nevnd 18. juni 2025:**
Forkv. mælir til at leigi hølini á Sjógøtu 2 út til Apoteksverkið sambært fyriliggjandi leigusáttmála. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina. -einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2025:**
Alvi Mortensen og Bjarni Hammer taka undir við tilmælinum hjá Sosialu nevnd at leigi hølini á Sjógøtu 2 út til Apoteksverkið sambært fyriliggjandi leigusáttmála. - Kristin Michelsen tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðið 26. juni 2025:**
Borgarstjórin kunnar um málið og greiðir frá, at Landsapotekarin hevur svara uppá spurning, hvørt Apotekið framhaldandi verður staðsett á Tvøroyri, Landsapotekarin upplýsir, at tað er ongin ætlan um at flyta Apotekið av Tvøroyri, men at tann avgerðin liggur endaligt hjá landstýrisfólkinum í heilsumálum.

Borgarstjórin mælir býráðnum til at atkvøða um tilmælið hjá Sosialu nevnd og meirilutanum í fíggjarnevndini, hvørt Tvøroyrar kommuna skal leiga hølini á Sjógøtu 2 til Apoteksverkið, samsv. fyriliggjandi leigusáttmála. -Einmælt samtykt

**51/25**
**24/00198-1 Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn -framtíðarætlanir**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 4 Vinnu- og havnanevndin | 25.02.2025 | 6/25 |
| 5 Fíggjarnevndin | 25.04.2025 | 36/25 |
| 6 Býráðið | 01.05.2025 | 28/25 |
| 7 Fíggjarnevndin | 26.05.2025 | 50/25 |
| 8 Býráðið | 02.06.2025 | 35/25 |
| 9 Býráðið | 26.06.2025 | 51/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 16.07.2024**
Kári Jespersen, nevndarumboð í Tvøroyrar Bygda- & Sjóvinnusavn, *umboðandi Tvøroyrar býráð*, hevur hin 16. Juni 2024 vent seg til kommunustjóran við tilmæli um, at kommunan arbeiðir fram ímóti, soleiðis at tað ber til hjá Tvøroyrar Bygda- & Sjóvinnusavn at realisera uppskotsætlanina, sum Mayfinn Norðoy Cand. Arch. legði fram fyri býráði í sep. 2023 *"Gamla Tvøroyri"*.

Tilmælið hjá Tvøroyrar Bygda- & Sjóvinnusavn er at fremja ætlanina í stigum, har Tvøroyrar kommuna í fyrsta umfari handar Tvøroyrar Bygda- & Sjóvinnusavn gamla Ísvirkið matr.nr 491, umframt at kommunan kannar, hvørt eigarin av matr.nr 494b, gamli Timburhandilin hjá RBT -matr.nr. kann ognast Tvøroyrar Bygda- & Sjóvinnusavn, evt. við at kommunan fremur eitt gerðabýti við matr. nr. 497a & 495.

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 17. juli 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað, einmælt samtykt at heimila umsitingini at kanna møguleikar og arbeiða víðari við ætlanini.

**Kommunustjórin 24. Okt.2024**
Kári Jespersen, leiðarin av Skjalasavninum hevur hin 24. Okt. 2024 kunna kommunustjóran um, at eigararnir av gaml. Timburhandlinum eftir Ric. B. Thomsen, matr.nr 494b, hava svara uppá fyrisp. frá Sokn adv. hvørt teir vilja selja henda gamla partin av timburhandlinum til Tvøroyrar Bygda- & Sjóvinnusavn.

Richard og Henrik Thomsen eigarar av timburhandlinum hava givið til kennar, at teir ikki ynskja at fremja gerðabýti við matr. nr. 497a & 495. *(koldepotið)*, men at teir vilja selja gamla timburhandilin fyri kr. 1,0 mió, við treyt um, at teir framhaldandi hava atgongd til niðaru hæddina í 5 ár, uttan leigukostnað.

Um Tvøroyrar Bygda- & Sjóvinnusavn skal ogna sær gaml. timburhandlinum eftir Ric. B. Thomsen, matr.nr 494b, er neyðugt at Tvøroyrar kommuna veitur 100% fíggjarligan stuðul til keypið, og avsetur hetta á FÆ2025.

**<u>Fíggjarnevndin 31. oktober 2024:</u>**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við, at Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn byrja tilgongd at ogna sær gaml. Timburhandilin á matr. nr 494b, har Tvøroyrar kommuna tryggjar fíggjarligan stuðul smsv. málslýsing dagf. 24. okt. 2024. -Málið verður beint í býráðið sum lukkað mál.

**<u>Býráðið 07. november 2024:</u>**
Tvøroyrar býráð samtykkir einmælt at heimila borgarstjóranum og umsitingini at arbeiða víðari við tilgongdini at loyva Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn at ogna sær gaml. Timburhandilin á matr. nr 494b, har Tvøroyrar kommuna tryggjar fíggjarligan stuðul smsv. málslýsing dagf. 24. okt. 2024. Og heimila borgarstjóranum og umsitingini at kanna, um ognarviðurskiftini av matr. Nr. 491, kunna skifta til Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn. Heitt verður á umsitingina at eftirmeta hvørt viðtøkurnar fyri Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn kann broytast til 5 limir har býráðið hevur umboð.

**Tekniski leiðarin (GM) 24.02.2025:**
Forfólkið í Vinnu- og havnanevndini ynskir eina støðulýsing av málinum.

**<u>Vinnu- og havnanevndin 25. februar 2025:</u>**
Nevndin er kunnað um gongdina, og heitir á umsitingina um at fáa málið avgreitt.

**<u>Kommunustjórin 22.04.2025:</u>**
Eyðbjørn Larsen, SOKN ADV., hevur avgreitt treyta skeyti, sum er undirskriv av eigarum av gaml. Timburhandlinum hjá RBT á matr.nr. 494b, og av nevndarform. og skrivara og nevndarlimi og kassameistara í Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn.

Sum kunna bleiv um 24. okt. 2024: Um Tvøroyrar Bygda- & Sjóvinnusavn skal ogna sær gaml. timburhandlinum eftir Ric. B. Thomsen, matr.nr 494b, er neyðugt at Tvøroyrar kommuna veitur 100% fíggjarligan stuðul til keypið, og avsetur hetta á FÆ2025.

Ongin játtan er avsett á FÆ2025 til Tvøroyrar Bygda- & Sjóvinnusavn sum stuðulsjáttan til keypa gaml. Timburhandlinum.

Kommunustjórin mælir til *-um ynskið hjá Tvøroyrar Bygda- & Sjóvinnusavn er at ogna sær gaml. Timburhandilin-* at Tvøroyrar Bygda- & Sjóvinnusavn kannar, hvørt tað ber til at keypa timburhandilin við lántøku.

**<u>Fíggjarnevndin 25. april 2025:</u>**
Fíggjarnevndin samtykkir einmælt at heimila borgarstjóranum at samráðast við eigara av matr.nr. 494b og við form. í Tvøroyrar Bygda- & Sjóvinnusavn um eina ætlan, hvussu keypið kann avgreiðast. Málið verður tikið upp aftur á fyrst komandi fundi í fíggjarnevndini.

**<u>Kommunustjórin 29.04.2025:</u>**
Kári Jespersen, nevndarumboð í Tvøroyrar Bygda- & Sjóvinnusavn og form. fyri verkætlanina at umvæla Pakkhús 18, hevur vent seg til kommunustjóran við upplýsing um, at ynskið er at kommunan garanterar fyri øllum keypspeninginum samsv. avtaluna, ið er gjørd við RBT -eigari av Pakkhús 17 (gamla timburhandlinum).

**Býráðið 01. maj 2025:**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini er einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 26. maj 2025:**
Einmælt samtykt at Tvøroyrar kommuna stuðlar Tvøroyrar bygda- og sjóvinnusavnið við kr. 1. mió, til keyp av gaml. Timburhandlinum hjá RBT á matr.nr. 494b, samsv. stuðulsumsóknini dagf. 29.4.2025. Stuðulin fyri 2025 verður kr. 500.000,- verður veittur sum eykajáttan av §721 íløgur til bátahavnir. Stuðulin fyri 2026 verður avsettur á FÆ2026.

**Býráðið 02. juni 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini. -málið skal hava tvinnar viðgerðir

**Býráðið 26. juni 2025:**
Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**52/25**
**24/00308-2 Føroya Eftirskúli -umsókn um stuðul skúlaári 2025**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 2 Mentanarnevndin | 12.05.2025 | 47/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 26.05.2025 | 52/25 |
| 4 Býráðið | 02.06.2025 | 36/25 |
| 5 Býráðið | 26.06.2025 | 52/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 27.10.2024**
Umsitingin hevur hin 24.10.2024 móttikið umsókn um stuðul frá Føroya Eftirskúla til virksemið skúlaárið 2025.

Skúlastjórin skrivar í umsókníni at:

*Eg vil við hesari umsókn spyrja Tvøroyrar Kommunu um stuðul fyri skúlaárið hjá Føroya Eftirskúla fyri skúlaárið 2025.*

*Tvøroyrar Býráð hevur verið virkin stuðul av Føroya Eftirskúla síðan skúlabyrjan 2020 og hevur árliga latið 400.000 kr í stuðli! Stuðulin var býttur í tvær serstakar játtanir*

- *Stuðul verður latin til gjald av hølisleigu, ljós og hita til undirvísingarhølir á Sjógøtu 2., kr. 200.000,-*
- *Stuðul verður latin til nýskapandi virksemið og rakstur skúlans. kr. 200.000,-*

*Eg vil við tí við hesari umsókn spyrja Tvøroyrar kommunu um somu upphædd fyri skúlaárið 2025.*

*Virksemi hjá Føroya Eftirskúla er rikið við stuðli frá Uttanríkis og Mentamálaráðnum og næmingagjaldið. Hartil kemur stuðulin frá Tvøroyar kommunu sum ger tað møguligt at reka tílíkt skúlatilboð sum er nýbrot í føroyskari skúlasøgu.*

*Í løtuni ganga 18 næmingar á skúlanum. Næmingarnir koma úr Føroyum, Danmark, Grønlandi og Týsklandi.*

*Tað eru 2 full størv knýtt at skúlanum, umframt fleiri tímasett størv! Í skrivandi løtu eru 13 fólk knýtt at virkseminum hjá Føroya Eftirskúla. Talan er áleið um 4 til 5 ársverk samanlagt.*

*Eru spurningar vil eg fegin svara teimum!*

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin og Løgtingslóg nr. 83 frá 17. mai 2000 um eftirskúlar.

*Kapittul 6, Fígging av rakstri og íløgum*

*§ 17. Virksemið hjá eftirskúlunum verður lutvíst fíggjað við stuðli, sum landsstýrismaðurin og kommunurnar útvega. írestandi fígging skal útvegast við næmingagjaldi og/ella privatum stuðli.*

*Stk. 2. Landskassans partur er:*

1. *Til allar rakstrarútreiðslur, heruppií útreiðslur til løn til skúlaleiðara, lærarar og onnur starvsfólk, ljós og hita, leigu, viðlíkahald, undirvísingartilfar, trygging o.s.fr, verða latín í mesta lagi 70% av kostnaðinum.*
2. *Til keyp av húsum, bygging ella um- og uppíbygging av húsum til eftirskúla verða eftir landsstýrismansins góðkenning sum rentu- og avdráttarfrítt lán latin í mesta lagi 50% av virðinum eftir virðismeting.*

**Fíggjarligar avleiðingar:** Avsett á FÆ2025, 418, Eftirskúlin í alt kr. 400.000,-, har av leigugjald fyri Sjógøtu 2, kr. 153.562,-

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 25. november 2024:**
Einmælt samtykt at lata stuðul til Føroya Eftirskúla fyri skúlaárið 2025 á kr. 400.000,- samsv. Umsókn 24.10.2024. Heitt verður á Føroya Eftir skúla um at innsenda roknskap, áðrenn stuðuls játtanin verður flutt. – Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentanarnevndin 12. maj 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað, og mælt verður til at útgjalda stuðulin samsv. umsókn 24.10.2024. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. maj 2025:**
Einmælt samtykt at veita stuðul til Føroya Eftirskúla kr. 400.000,-. Játtanin verður veitt av FÆ2024, §418. Málið verður beint í býráðið, har skúlastjórn møtir at greiða frá gongdini í Føroya Eftirskúla.

**Býráðið 02. juni 2025:**
Á forfundi við Tvøroyrar býráð í dag 2. Juni 2025, kl. 17.00 møtti skúlastjórin fyri Føroya Eftirskúla, Pól Arni Holm at greiða frá um Føroya Eftirskúla.

**Býráðið 02. juni 2025:**
Á forfundi við Tvøroyrar býráð í dag 2. Juni 2025, kl. 17.00 møtti skúlastjórin fyri Føroya Eftirskúla, Pól Arni Holm at greiða frá um Føroya Eftirskúla. Kristin Michelsen mælir til at útseta hetta mál, til greiða fæst á hvørja ætlanir Barna og Útbúgvingarmálaráðið hevur við Føroya Eftirskúla -einmælt samtykt

**Kommunustjórin 23.06.2025:**
Umsitingin hevur móttikið skriv frá Føroya Eftirskúla, har í kunna verður um avgerð hjá BUMR "Barna- og útbúgvingarmálaráðið", við treytum um undantak hjá Føroya Eftirskúla at halda fram, sum skúli 2025/2026:

BUMR skriva m.a.:
***Avgerð viðvíkjandi framhaldandi virksemi***
Sagt verður frá, at við heimild í løgtingslóg nr. 83 frá 17. mai 2000 um eftirskúlar § 6, stk. 2, har ásett er, at landsstýrismaðurin kann loyva skúlanum at halda fram við ella uttan stuðul, sjálvt um skúlin ikki lýkur ásetingarnar viðvíkjandi kravda næmingatalinum, hevur landsstýrismaðurin tikið avgerð um at játta skúlanum at halda fram skúlaárið 2025- 2026 við lækkaðum næmingatali og fíggjarligum stuðli.

Loyvið til at halda áfram er ***einans galdandi fyri skúlaárið 2025-2026, og verður ikki longt uttan*** so at **allar** hesar treytir pr. 1. apríl 2026 eru loknar:

- Næmingatalið **skal** vera 16
- Talan skal vera um **føroyskar** næmingar, vísandi til § 10
- **Fíggjarligu viðurskiftini** skulu verða fingin í rættlag.

Viðmerkjast skal, at tað ikki verður møguligt at víkja frá omanfyri standandi treytum.

***Góðkenning av hølum***
Góðkenning av hølum Vísandi til § 5, stk. 3 í lógini skulu vit minna skúlan á, at landsstýrismaðurin skal góðkenna bæði hølir og útbúnað. Tískil skal skúlin senda inn upplýsingar um hølini, har næmingar skulu búleikast umframt har undirvísing skal vera, saman við váttan um, at talan er um hølir, sum lúka krøv í aðrari lóggávu, eitt nú atkomu, brunaviðurskiftir o.a. Upplýsingar og váttanir frá kommunu og brunaumsjón v.m. skal verða ráðnum í hendi í seinasta lagi 1. august 2025.
Viðmerkjast skal, at einki virksemi kann fara fram í hølunum, áðrenn endalig góðkenning frá ráðnum fyriliggur.

**Býráðið 26. juni 2025:**
Einmælt samtykt at veita stuðul til Føroya Eftirskúla á kr. 400.000,-. Játtanin verður veitt av FÆ2025, §418, og at stuðulin var býttur í tvær serstakar játtanir:

- Stuðul verður latin til gjald av hølisleigu, ljós og hita á kr. 200.000,-
- Stuðul verður latin til nýskapandi virksemið og rakstur skúlans á kr. 200.000,-

**53/25**
**25/00214-2 VERKFO - Fyrispurningur um grót til útfylling til keiøkið**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 16.06.2025 | 15/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.06.2025 | 68/25 |
| 3 Býráðið | 26.06.2025 | 53/25 |

**Málslýsing:**
Fylgjandi fyrispurningur er tann 30.04.2025 komin frá Hans Haraldsen, vegna Varðan Pelagic:

*"Góðan dagin!*
*Í sambandi við útfyllingina av nýggja kaiøkinum, hava vit umframt grótið frá Hvalbiartunnlinum, brúk fyri uml. 50.000 m3 eyka av gróti.*
*Vilja við hesum skrivi spyrja, um kommunan er áhuga at veita manglandi gróti úr grótbrotinum í Akurgerði, við somu treytum sum grótið frá Hvalbiartunnlinum.*

*Partur av manglandi grótinum er dekkgrót. Nøgd og stødd av dekkgróti, ynskja vit at fastleggja við kommununa áðrenn sprongt verður.*

*Vit hava dronuuppmating av øllum lendinum við Akurgerði. Tá moldin er grivin omanav, kann hellan mátast inn áðrenn og aftaná tað er sprongt. Uppmátingin kann brúkast til eftirkanning av grótnøgdunum."*

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:**
Tekniska deild mælir til at geva loyvi, treytað av, at umsøkjarin uppfyllir nakrar treytir, sum kommunan ásetir, í sambandi við umhvørvisvernd, útreiðslur, ið kunnu væntast av arbeiðinum, liðugtgerð av økinum, eftir at útvinningin av gróti er liðug o.l.
Málið snýr seg um ogn hjá kommununi, og má tí eisini viðgerast í Fíggjarnevndini og Býráðnum.

**Tekniska nevnd 16. juni 2025:**
Eyð Eidesgaard hevur ikki verið við í viðgerðini av hesum málinum.
Nevndin er samd um tilmæli frá umsitingini. Málið verður beint víðari í Fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá umsiting og teknisku nevnd. -Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 26. juni 2025:**
Eið Eidesgaard metti seg verða ógegnina og var ikki við í viðgerðini av hesum málinum.
Einmælt samtykt tilmælið hjá umsitingin, teknisku nevnd og fíggjarnevndini, at til at geva loyvi til at útvega gróti úr grótbrotinum í Akurgerði, við treytum, sum kommunan ásetir.

## 54/25
## 25/00257-2 Dráttur til nýggja kappróðrarneystið hjá FSR

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 18.06.2025 | 14/25 |
| 2 Býráðið | 26.06.2025 | 54/25 |

**Málslýsing:**
Kommunan hevur fingið tilboð frá MTV um at byggja nýggjan bátadrátt til kappróðrarneystið á Hvítanesi.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Kostnaðarmeting: 445.610 kr

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Vinnu- og havnanevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Vinnu- og havnanevndin 18. juni 2025:**
Nevndin hevur viðgjørt innkomna byggiloyvi í samráð við limirnir í teknisku deild og umsitingini, og mælt verður til at geva byggiloyvi. Ein samd nevnd mælir eisini til at taka av fyriliggjandi tilboði frá MTV-byggivirkið uppá at byggja ein bátadrátt til FSR.

**Tekniska deild 25-06-2025:**
Býráðið verður biðið um at geva undantaksloyvi til at gera nýggjan bátadrátt til kappróðrarneystið á Hvítanesi, orsaka av, at hann fer út um økið sum er lagt út til bygging í byggisamtyktini.
Nevnast kann, at talan er ikki um at gera nýtt lendi við útfylling á sjógv, men at gera eina konstrúktión, sum kann takast sundur, um tað verður ynskt í framtíðini.
Til samanberingar sæst tað á kortal.fo, at líknandi konstruktiónir allar eru gjørdar uttan fyri økið í byggisamtyktini í Tórshavn.

**Býráðið 26. juni 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Vinnu- og havnanevndini at geva frávik í byggisamtyktini, og geva byggiloyvið til nýggjan bátadrátt til kappróðrarneystið á Hvítanesi, samsv. fyriliggjandi ætlanir.

Borgarstjórin mælir til, at heimila FSR játtan á kr. 758.620,- av FÆ2025, §525 til keyp av innbúgv og til bygging av drátti, samsv. umsókn frá forkv. í FSR, Kristinu Roest, dagf. 18.06.2025. -Einmælt samtykt.

**55/25**
**24/00074-2 Økistónar · Umsókn um stuðulsskipan til føroysk spælistøð, ið skal tryggja úti við 600 konsertir kring landið.**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 3 Býráðið | 26.06.2025 | 55/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 4.3.2024**
Umsitingin hevur móttikið teldupost frá Tónleikasambandi Føroyar, sum søkir um stuðul til skipan av konsertir kring landið.

Umsóknin er m.a. orðað soleiðis:

*Vit arbeiða við eini stuðulsskipan til føroysk spælistøð, ið skal tryggja úti við 600 konsertir kring landið árliga. Grundtankin er, at landið rindar helvtina av tí skipanin kostar, meðan kommunurnar rinda hina helvtina. Skal ikki troytta við smálutum, men greitt er nú, at 500.000 krónur eru játtaðar á løgtingsins fíggjarlóg fyri 2024 samstundis sum Tórshavnar Kommuna hevur givið tilsøgn um, at tey vilja verða við til at játta helvtina av kommunala partinum (tvs 250.000 krónur, sum nú er). Hina helvtina (250.000 krónur) vóna vit so, at aðrar góðar (vónandi allar) kommunur vilja vera við til at fíggja.Vit meta, at ein slík skipan lættliga kann geva meira pengar inn í kommunu kassan enn fer út, um skipanin verður væl gagnýtt og kommunan er virkisfús innan mentanarøkið.*

**Lógargrundarlag:** komunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 11. marts 2024:**
Form. mælir til ikki at stuðla uppá núverandi tíðspunkt, men ynskir at hoyra nærri hvussu Økistónar koma at virka, hvør kann søkja um stuðul frá Økistónum.

**Kommunustjórin 14.04.2024:**
Dánjal á Neystabø, formaður í Tónleikasambandi Føroya hevur sent borgarstjóranum nærri frág. til verkætlanina Økistónar, eftir at Tónleikasambandi Føroya (TSF), var á Hotel Føroyum, og greiddi borgarstjórum frá um skipanina:

***Økistónar.***

*Í stuttum er talan um eina stuðulsskipan fyri konsertfyriskiparar, ið skal tryggja konsertir landið runt, árið runt. Skipanin verður fíggjað 50/50 millum land og kommunur. Sostatt er møguligt hjá kommunum at fáa 2 krónur fyri 1, tá landið jú veitir helvtina av peninginum.*

*Á Hotel Føroyum hevði Kristin Michelsen, borgarstjóri ein spurning um ferðastuðul. Hann nevdi at konsertfyriskiparar í Suðuroy ofta hava fleiri útreiðslur til ferðing. Og hann spurdi um tað ber til at gera nakað við hetta? Svarið er ja :)*

*Vit hava práta við "Gramexgrunn Føroya" og tey vilja fegin veita konsertfyriskiparum ferðastuðul, soleiðis at tað ikki gerst torføri at skipa fyri hjá summum. Endamálið við skipanini er nevniliga, at gera tað møguligt at skipa fyri konsertum kring allar Føroyar.*
--

*Tónleikasamband Føroya ynskir nevniliga at fáa greiði á sum skjótast, hvørjar kommunur ynskja at vera við. Øll norðanlond hava eina tílíka skipan, og hava havt ein slíka í áratíggju. TSF hevur farna árið verið í støðugum samskifti við kommunur, landsmyndugleikan og konsertfyriskiparafelagið um økistonar, og fleiri kommunur hava longu givið játtandi svar.*

*Spurningurin er so, hvør er skilabesta loysnin fyri kommunurnar at rinda inn í hesa skipan. Semja tykist at vera um, at rættast er at seta eitt krónutal fyri hvønn íbúgva. Tann vegin rinda allar kommunurnar lutfalsliga tað sama í skipanina.*

*Tónleikasamband Føroya ynskir at oktober, november og desember gerast royndartíð fyri Økistónar.*

*Vit skjóta tí upp, at tær kommunurnar, sum ynskja at vera við, rinda 1 krónu per mánað per íbúgva;*

*Sostatt siga 3 krónur (oktober, november og desember) faldað við samlaða íbúgvaratalið. Tað vil siga, at ein kommuna við 1.000 íbúgvum rindar 3.000. krónur inn í skipanina fyri 2024.*

**<u>Mentanarnevndin 22. april 2024:</u>**
Einmælt samtykt, at lata í stuðul kr. 3,-/ pr. borgara í Tvøroyrar kommunu. Hetta sum eina roynd í innverandi ári fyri 3. mðr (oktober, november og desember).

**<u>Kommunustjórin 25.06.2025:</u>**
Stjórin í kommunufelagnum hevur vent seg til kommunustjóran við fyrisp. um hvørt Tvøroyrar kommuna ynskir framhaldandi at luttaka við at stuðla tiltakinum «Økistónar»

Kunning um økistónar: *(Kommunufelagið)*

*Í tíðarskeiðnum 1. Oktober 2024 - 1. januar 2025 játtaðu 19 kommunur tilsamans 191 túsund kr. til Økistónar sum svarar til 1 kr. pr borgara pr. mánað.*
*Fyrsta skeið hevur hepnast sera væl. Økistónar fingu 37 umsóknir frá føroyskum fyriskiparum, og stuðul varð játtaður til 35 umsøkjarar. Samlaða játtanin fyrsta skeiðið var 191.000 kr. frá landinum og 191.000 kr. frá kommununum ella til samans góðar 380.000 kr. Søkt var um omanfyri 1 mió. kr. 21 ymisk spælistøð kring alt landið søktu. Úrslitið av fyrsta skeiði eru 62 konsertir í tíðarskeiðinum 1. oktober 2024 - 1. Januar 2025.*

*Fleiri kommunur vísti áhuga fyri at halda áfram við at stuðla økistónum, og nakrar kommunur hava longu játtað at halda áfram við at stuðla skipanini við 1 kr pr. Borgara per mánað.*

*Fyri at fáa yvirlit yvir hvussu stór játtanin er fyri 2025, fara vit at heita á kommunurnar sum ynskja at verða við í skipanini um at boða skrivstovuni frá hesum so skjótt sum til ber.*

Tvøroyrar býráð verður at taka støðu til, hvørt Tvøroyrar kommunan stuðlar Økistónum fyri inniverandi ár 2025 við kr. 1,-/pr. borgara pr. mðr., svarandi til kr. 20.736,- *(fólkatal pr. 01.05.2025).* Mælt verður til at veita stuðul av §522, stuðul til mentan.

**Býráðið 26. juni 2025:**

Forkv í Mentanarnevndini mælir til at stuðla Økistónum samsv. umsókn við kr. 1,-/pr. borgara pr. mðr., svarandi til kr. 20.736,- (fólkatal pr. 01.05.2025) -Einmælt samtykt.

Fundurin lokin kl. 18:40

---

Kristin Michelsen

---

Anita Vibergsdóttir

---

Tóki Justinussen

---

Barbara Michalina Tausen

---

Bjarni Hammer

---

Eyð Jóna Eidesgaard

---

Jens Rói Sørensen